# Róð úr Skotlandi til Føroya í kajakk




**Tveir bretar komu klokkan 15:30 fríggjadagin á land á Eiðinum í Vági, eftir at hava róð úr Skotlandi til Føroya í Kajakk**

FERÐ
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bretarnir Mick Berwick og Patrick Winterton komu klokkan 15:30 á land vesturi á Eiðinum í Vági. Teir hava róð úr Stornoway og til Føroya. Teir byrjaðu ferðina 27. juni. Ferði tók teimum á leið 74 tímar.

Móðir, men glaðir, settu teir beinini á føroyska jørð, og søgdu seg fegnast yvir vøkru sjónina, ið møtti teimum, tá Føroyar vóru í eygsjón. Og ikki minni vakurt var at koma á land á Eiðinum í Vági í brennandi sól.

Teir hava á leiðini havt samband við suðuroyingar, eittnú Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag, sum eisini var við bátinum Royndini úti fyri at taka ímóti. Men illa gekst at finna tær báðar kajakkirnar fríggjadagin, men at enda vóru tær í eygsjón útfyri Vágseiði.

Nógvurmjørki var fríggjadagin, og rógvararnir greiddi frá, at bráddliga vóru teir staddir við síðuna av einum partrolara, og so var bara at sleppa sær burtur, tí spurningurin var hvar hin trolarin var, og um teir vóru soleiðis staddir, at teir komu trolið.

Endamálið við ferðini er at savna pening til bretska bjargingarfelagið RNLI. St. Brendan hevur verið stóri íblásturin til ferðina.

Leiðin hevur verið úr Stornoway til Butt of Lewis til North Rona og til Føroya. Tá teir komu á land í Suðuroynni tóku suðuroyingar sær væl av møddu ferðamonnunum. Eittnú fingu teir kaffi í Vági. David Findleton, ið er skoti, og býr á Tvøroyri, var við til móttøkuna, og báðir rógvararnir fingu mat, drekka og innivist, og njóta komandi dagarnar føroskt gestablíðni og føroysku náttúruna.

6.- 8. august 2009
www.summarfestivalur.fo
ATGM. TICKETS
Keypið atgongumerki NÚ
SPAR PENING til Føroya størsta festival
17. Juli hækkar prísurin



HAR HITTINI HITTAST
Voulez Vous | The Winner Takes It All | One Of Us | Eagle | Take A Chance On Me | Knowing Me Knowing You | Angel Eyes | Our Last Summer | Super Trouper | Does Your Mother Know Thank You For The Music | Massachusetts | I Started A Joke | I've Gotta Get A Message To You | Don't Forget To Remember | Saved By The Bell | Nights On Broadway | For Whom The Bell Tolls | Secret Love | Words | Boing | En Dag Tilbage | Lækker | Kan Du Høre Hende Synge Ta'Mig Tilbage | Eros | Føroyar | Á um vit | Grøv nr. 13 | Pápi tín býr ei í Tórshavn | Herbergið Forelskaður sjónleikari osv...

NORÐOYA SPARIKASSI
Sosialurin
FØROYATELE
Summar FESTIVALUR
– HAR HITTINI HITTAST
Postverk Føroya | BORG | TRYGD | magn | NORÐHÚS | Ivan Johansen Bilar | ATLANTIC AIRWAYS | Føroya Bjór | klaksvíkar kommuna | J.A.P.